# Umsóknarblað

Umsóknarblað til tænastu er á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu.

Í umsóknini gevur borgarin loyvi til eitt sjálvvirkandi gjald av tænastuni.

Søkt verður á Vanganum ella við at senda umsóknarblað til:

**Heilsu- og umsorganartænastuna**
Postboks 32 • FO-110 Tórshavn




Februar 2026

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

**TÓRSHAVNAR KOMMUNA**

Postmoga 32
FO-110 Tórshavn
+298 302010
torshavn@torshavn.fo

**UPPLATINGARTÍÐIR**

Mánadag-hósdag 9.00-16.00
Fríggjadag 9.00-15.00

Leygardag og sunnudag stongt

UMSORGAN OG RØKT

# Dag- og kvøldtilboð





**Kjarnuuppgávan hjá Heilsu- og umsorganartænastuni er við miðvísari umsorgan, tænastu, heimatænastu, heilsu- og sjúkrarøkt at stuðla borgaran soleiðis, at hann gerst virkin og vakin alt lívið.**

**Heilsurøkt og umsorgan er eitt týdningarmikið málsøki hjá Tórshavnar kommunu, sum vil ganga á odda og veita skjóta og góða heildartænastu.**

UMSORGAN OG RØKT

# Dag- og kvøldtilboð

**Dag- og kvølditilboð eru til borgarar, sum ikki hava møguleika at luttaka í tilboðum, sum Heilsu- og umsorganartænastan annars bjóðar t.d. Tilhaldið.**

Tað eru trý skipað dag- og kvøldtilboð. Tilboðið í Stjørnulon og Tjarnarlon er til borgarar við demenssjúku. Virkis- og venjingarstovan er til fólkapensjónistar, ið fatanarliga, sálarliga og sosialt eru før fyri at fyri at taka virknan lut í tilboðnum.

Endamálið við dag- og kvøldtilboðum er at skapa møguleikar fyri at kunna vera virkin, vera hugbundin og vera saman. Soleiðis verður stuðlað undir einum virknum og innihaldsríkum gerandisdegi.

Dentur verður lagdur á rørslu, kost, heilsustimbran og fyribyrging, og at allir borgarar skulu kenna seg sum part av felagsskapinum.

Dag- og kvøldtilboð er eitt tørvsmett tilboð, og tí má søkjast um tilboðið.

## Kostnaður

Tú rindar eitt gjald fyri dag- og kvøldtilboð.

Gjaldið er ásett her:
[Brúkaragjøld í Tórshavnar kommunu]

## Demens

Stjørnulon og Tjarnarlon eru tilboð til borgarar við demenssjúku. Dentur verður lagdur á trivnað og lívsgleði, hóast minnið er viknað.

Vit gera mat, baka, gera fimleik, spæla kort, skipa fyri útferðum, binda og mangt annað.

**STJØRNULON**
Jøkulsstræti 4, tlf. 31 81 09 ella 21 81 09

| | | |
|---|---|---|
| Opið er: | Mánadag | kl. 11.30-15.00 |
| | Týsdag-fríggjadag | kl. 9.00-15.00 |

Pláss er fyri 10 fólkum.

**TJARNARLON**
Stoffalág 84, tlf. 79 00 67

| | | |
|---|---|---|
| Dagtilboð er opið: | Mánadag-hósdag | kl. 9.00-15.00 |
| | Fríggjadag | kl. 9.00-13.00 |
| Kvøldtilboð er opið: | Mánadag-hósdag | kl. 16.00-21.00 |

Pláss er fyri 12 fólkum um dagin og 8 fólkum um kvøldið.

## Virkis- og venjingarstova

Virkis- og venjingarstova er á Lágargarði. Her hava fólk møguleika fyri at hittast, hugna sær og gera ymisk ítriv, sum gevur meining fyri tey. Tað kann t.d. vera fimleikur, gongutúrar í nærumhvørvinum, handarbeiði, dansur, sangur, hugnaløtur, bob ella dart.

**LÁGARGARÐUR**
Stoffalág 84, tlf. 21 07 14

| | | |
|---|---|---|
| Opið er: | Mánadag, mikudag og hósdag | kl. 9.00-15.30 |
| | Týsdag | kl. 11.30-15.30 |
| | Fríggjadag | kl. 9.00-13.00 |

Pláss er fyri tilsamans 60 fólkum, upp til 30 fólk ísenn.